# Viðurgjaldsfrágreiðing fyri Betri Banka

## 2024

## Innihaldsyvirlit

Inngangur ........ 3
Fíggjarlig úrslit ........ 4
Alment um samsýning til nevnd og stjórn ........ 4
Samsýning til nevnd ........ 5
Samsýning til nevnd fyri roknskaparárið 2024 ........ 6
Samsýning til stjórn ........ 7
Samsýning til stjórn fyri roknskaparárið 2024 ........ 7

# Inngangur

Henda viðurgjaldsfrágreiðing greiðir frá tí samsýning, sum hvør limur í nevnd og stjórn í Betri Banka P/F, skrásetingarnummar 5534, hevur móttikið í roknskaparárinum 2024.

Viðurgjaldsfrágreiðingin inniheldur eisini samanlíkningar tøl fyri tíðarskeiðið 2022 til og við 2024.

Samsýningin til nevnd og stjórn fyri 2024 er latin í tráð við lønarpolitikkin hjá bankanum.

Lønarpolitikkurin hjá Betri Banka fevnir um kravið í §71 í bekendtgørelse af anordning om ikrafttræden for Færøerne af lov om finansiel virksomhed, líkasum viðurgjaldsfrágreiðingin samsvarar við ásetingina um upplýsingarkrøvini í §77d, stk 6

Lønarpolitikkurin hjá Betri Banka varð seinast góðkendur á aðalfundinum hjá Betri Banka hin 12. apríl 2024, og er atkomiligur á heimasíðu bankans, www.betri.fo/banki/um-okkum/um-okkum.

Upplýsingarnar, sum eru tiknar við í hesa viðurgjaldsfrágreiðing, eru tiknar frá bókhaldinum hjá bankanum og frá grannskoðaðu ársfrásøgn bankans, sum er atkomilig á heimasíðu bankans.

## Fíggjarlig úrslit

Fyri nærri umrøðu av fíggjarligu úrslitum bankans fyri roknskaparárini 2022-2024, verður víst til ársfrásøgnina hjá bankanum fyri tey respektivu árini.

## Alment um samsýning til nevnd og stjórn

Í tráð við lønarpolitikkin hjá bankanum, verða nevnd og stjórn í bankanum lønt við eini fastari løn.

Lønarpolitikkurin hevur yvirskipað til endamáls at seta leiðreglur fyri áseting av løn, sum aftur er í tráð við og fremur eina skinsama og virkna váðastýring, sum ikki skundar undir, at tiknar verða ovurhonds stórar váðar. Tað er harafturat endamálið við lønarpolitikkinum, at hesin er í tráð við, og styðjar uppundir virkisætlanina hjá bankanum, stevnumið, virðir og langtíðar áhugamál, herundir eina haldgóða virkisætlan. Somuleiðis er lønin ikki tengd at styttri tíðarmálum og rakstrarúrslitum

Á henda hátt viðvirkar lønarpolitikkurin eisini til burðardygd.

Lønarpolitikkurin skal vera kynsneutralur soleiðis, at bankin, uttan mun til kyn, skal tryggja líka løn fyri líka arbeiði ella arbeiði av sama virði.

At enda skal lønarpolitikkurin vera í tráð við lógarásetingar um verju av kundum og íleggjarum og lóggávu annars.

# Samsýning til nevnd

Nevndarlimirnir hjá bankanum fáa eitt fast gjald, sum aðalfundurin hjá bankanum góðkennir.

Strembað verður eftir, at nevndarsamsýningin skal vera í tráð við marknaðarsiðvenju fyri samanberandi peningastovnar, og í tráð við kravdu førleikar, avrik og vav av arbeiðinum hjá nevndarlimunum.

Formaðurin og næstformaðurin móttaka hvørt ár ein margfald, á ávikavist tríggjar og tvær ferðir samsýningina fyri víðkaðu uppgávurnar, sum hesir fremja.

Nevndarlimir, sum luttaka í ávikavist váðanevndini, tilnevningarnevndini og samsýningarnevndini, fáa ikki serskilda samsýning.

Aðalfundurin hjá bankanum hevur góðkent niðanfyrinevndu samsýningar fyri roknskaparárið 2024.

| **Føst árlig samsýning í Tdkr.** | **2024** |
|---|---:|
| **Nevnd** | |
| Formaður | 630 |
| Næstformaður | 420 |
| Nevndarlimur | 210 |
| **Váðanevnd** | |
| Formaður | 0 |
| Limur | 0 |
| **Tilnevningarnevnd** | |
| Formaður | 0 |
| Limur | 0 |
| **Samsýningarnevnd** | |
| Formaður | 0 |
| Limur | 0 |

## *Samsýning til nevnd fyri roknskaparárið 2024*

| Samsýning í Tdkr | 2024 | 2023 | 2022 |
|---|---|---|---|
| **Nevnd 1) 2)** | | | |
| Flemming B. Nielsen, Nevndarformaður | 630 | 630 | 630 |
| Evy J.Jacobsen 3) | 0 | 0 | 0 |
| Jens Johan Dam | 151 | 0 | 0 |
| Ivan Christiansen | 210 | 210 | 210 |
| Janet Fríða Johannesen | 210 | 210 | 210 |
| Marion á Lakjuni | 210 | 210 | 210 |
| Sverri Mohr Edvinsson | 210 | 150 | 0 |
| Ann Gvøðny Dánialsdóttir | 210 | 210 | 210 |
| Tanja Marnadóttir Ósá | 210 | 150 | 0 |
| Aslaug Gisladóttir | 60 | 210 | 210 |
| Margareth Dalheim Djurhuus | 0 | 61 | 210 |
| Kristian Østergaard | 0 | 61 | 210 |
| | | | |
| Útreiðsluendurgjald til nevndarlimir er ikki tikið við í yvirlitið. | | | |

1) Nevndarlimir hava ikki rætt til samsýning, eftir at teir eru farnir frá.

2) Nevndin er ikki fevnd av nakrari bonusskipan, sum er sett í verk av bankanum.

3) Evy J. Jacobsen er stjóri í moðurfelagnum og samsýningin fyri nevndararbeiði er partur av lønini sum stjóri í móðurfelagnum.

# Samsýning til stjórn

Viðurgjaldsavtalur og setanartreytir annars fyri stjórnarlimir verða ásettar millum tað av nevndini settu samsýningarnevnd og tann einstaka stjórnarlimin til endaliga góðkenning av nevndini í bankanum. Viðurgjaldsavtalur kunnu gerast fyri fleiri ár.

Samsýningin og samansetingin til hvønn einstaka stjórnarlim er ásett við tí fyri eyga at tiltrekkja og halda fast við vælskikkaðar stjórnarlimir.

Viðurgjaldið til hvønn stjórnarlim er ein føst samsýning og er samansett av hesum staklutum:

a) Føst grundløn
b) Fast pensjónsgjald
c) Vanligar starvsfólkaágóðar, sum ikki eru í peningi.

Umframt hetta kann rindast fráfaringarsamsýning.

## *Samsýning til stjórn fyri roknskaparárið 2024*

| **Samsýning Tdkr (2024)** | **Føst samsýning** | **Pensjón** | **Onnur samsýning** | **Tilsamans** |
|---|---|---|---|---|
| **Stjórn 1) 2)** | | | | |
| Jean Djurhuus, forstjóri | 2.698 | 399 | 85 | **3.182** |
| Olav Guttesen, stjóri | 2.226 | 263 | 85 | **2.574** |

| **Samsýning Tdkr (2023)** | **Føst samsýning** | **Pensjón** | **Onnur samsýning** | **Tilsamans** |
|---|---|---|---|---|
| **Stjórn 1) 2)** | | | | |
| Jean Djurhuus, forstjóri | 2.633 | 390 | 84 | **3.107** |
| Olav Guttesen, stjóri | 2.172 | 257 | 84 | **2.513** |

| **Samsýning í Tdkr (2022)** | **Føst samsýning** | **Pensjón** | **Onnur samsýning** | **Tilsamans** |
|---|---|---|---|---|
| **Stjórn 1) 2)** | | | | |
| Jean Djurhuus, forstjóri | 2.446 | 367 | 90 | **2.903** |
| Olav Guttesen, stjóri | 1.996 | 243 | 90 | **2.329** |
| | | | | |
| Útreiðsluendurgjald til stjórnarlimir er ikki tikið við í yvirlitið. | | | | |

1) Stjórnin hevur frían bil.

2) Forstjórin og stjórin kunnu av Betri Banka uppsigast við 12 mánaðar freist og kunnu sjálvir siga upp við 6 mánaðar freist. Fráfaringarsamsýningin, um stjóri verður sagdur upp, er 24 mðr. løn.

3) Stjórnin er ikki fevnd av nakrari bonusskipan, sum er sett í verk av bankanum.